## Schumacher S á Nurburgring

Týska formil 1 breytin Nurburgring hevur gjørt av at kalla ein part av breytini upp eftir sjeyfalda heimsmeistararnum í formil 1, týska Michael Schumacher. Schumacher vann fimm ferðir á Nurburgring á sini yrkisleið. Nú hann er givin í ítróttinum hevur leiðslan fyri breytina gjørt av at doypa skjóta S'partin av breytini til Schumacher S'ið. S'ið skiftir navn í sambandi við týsku formil 1 koyringina 22.juli og í hesum sambandi fer Michael Schumacher at koyra eitt umfar á breytini, skrivar f1.com.

**nud**



## Telefonitis í Georgia

Rasmus Nolsøe og Súni Olsen fingu báðir í gjár sítt viðføri til Georgia, men enn vantar okkurt kuffert í hjá føroyska ferðalagnum. Bláa kuffertið hjá Paula Magnussen, teknikkara í Útvarpinum, er framvegis ikki komið vegin fram. Hetta merkir tó ikki, at Útvarpið ikki fer at senda, tí teir báðir útsendu hava funnið upp á ráð, soleiðis at fólk heima í Føroyum róliga kunnu skrúva útvarpstólið frá klokkan fimm og hoyra beinleiðis frásøgn úr Georgia. Á myndini hava síggja vit Paula Magnussen við Fótbóltssambandinum í øðrum oyranum og Føroya Tele í hinum, meðan hann roynir at fáa greiðu á, hvussu teir best fáa sent heim í kvøld.

**rwd**

# Sama Merkið við síðani 1999

**Merkið, sum Hallur Sumberg, Gudmundur Djurhuus og Tommy Tausen hava við sær í Tbilisi, hevur verið við teimum í Kekkia, Sveis, Luksemburg, Frankaríki, Týsklandi og nú eisini Georgia. – Vit eru klárir, siga suðuroyingarnir, sum hava lagt ein taktikk, hvussu teir best hoyrast millum teir 20.000 georgisku áskoðararnar**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Um vit rópa, tá hinir áskoðararnir eru friðarligir, og tað vera teir fyrr ella seinni, so kunnu vit hoyrast, siga Hallur Sumberg, Gudmundur Djurhuus og Tommy Tausen, sum her eru avmyndaðir á Freedom Square í miðbýnum í Tbilisi*

*Mynd: Einslistir*

**Tbilisi, Georgia:** Tað er týskvøld í georgiska høvuðsstaðnum Tbilisi, og vit hava sett teimum einastu føroysku áskoðarunum stevnu á kamar nummar 620 á Hotel Marriott Courtyard, at práta um, hvussu teir fara at markera seg undir dystinum í kvøld.

– Tað nyttar einki at rópa ímóti 20.000 áskoðarum, staðfestir Tommy Tausen beinanvegin, tá samrøðan byrjar. Men fyri at hoyrast hava suðuroyingarnir lagt ein taktikk. Gudmundur Djurhuus samanber henda taktikk við tann, sum landsliðið ofta brúkar, har tað verður sagt, at um landsliðið skal hava nakrar møguleikar í dystinum, so verður tað upp á kontraálop ella deyðbóltar, meðan hitt liðið ikki ordiliga er klárt.

– Um vit rópa, tá hinir áskoðararnir eru friðarligir, og tað vera teir fyrr ella seinni, so kunnu vit hoyrast. Eg havi roynt sovorðið áður, tá vit spældu móti Kekkia og bara vóru nakrir heilt fáir áskoðarar. Tá hinir vóru friðarligir, róptu vit og hoyrdust. Tað fara vit eisini at gera hesaferð, greiðir Gudmundur Djurhuus frá.

### Merkið á ferð

Við sær á stadion í dag, hava Hallur, Gudmundur og Tommy føroyska flaggið, Merkið, sum hevur fylgt teimum á mangari ferð.

– Vit hava havt tað við í Kekkia, Sveis, Luksemburg, Frankaríki, Týsklandi og nú Georgia. Ja, á hvørjari ferð síðani vit keyptu flaggið frá 12. manni í 1999, greiðir Gudmundur Djurhuus frá. Hann skoytir so upp í, at tað ger tað ikki verri heldur, at Tommy Tausen er nærmasta familja hjá Jens Olivur Lisberg í Fámjin, sum teknaði Merkið. Jens Olivur Lisberg var systkinabarn mammu Tommy.

### Fátækardømi, flott náttúra og gott vín

Tá vit spyrja teir tríggjar, hvat teir serliga hava heft seg við her í Georgia nú ferðin skjótt er komin at enda, eru teir ikki í iva.

– Fátækardømi er øgiligt, siga teir og nevna eina gamla og ógvuliga sjúka konu, sum lá og biddaði. Eisini hava teir rent seg inn í nakrar heilt ungar smádreingir, sum hingu seg í brøkur teirra og kistu hendurnar á teimum og bóðu um pengar.

– Tað var ræðuligt, men her síggja vit veruliga, hvussu gott vit hava tað á okkara leiðum, vísur Hallur Sumberg á.

Fátækardømi er óhugnaligi parturin av teirra upplivingum í Georgia, men tá eg spyrji eftir góðum upplivingum, eru teir eisini skjótir at svara.

– Náttúran er øgiliga flott her, og so eisini í vínið. Vínið er serstakliga gott og betri enn vit eru vanir við, sigur Gudmundur Djurhuus og vísir aftur á tað, hann segði í gjár, at tey sum hava tað gott í Georgia, hava tað ordiliga gott, meðan tey, sum hava tað ringt, veruliga hava tað ringt.

# Georgiskir áskoðarar til venjingina

**Tá føroyska landsliðið vandi seinnapartin í gjár, vóru ikki bara nógv fjølmiðlafólk til staðar, men eisini fleiri áskoðarar og fylgdu føroysku venjingini**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Tbilisi, Georgia:** Klokkan 17.00 lokala tíð í gjár vandi føroyska landsliðið á Boris Paichadze National Stadium, tjóðarleikvøllinum í Tbilisi. Talan er um eitt stórt og prýðiligt stadion sum rúmar 78.000 áskoðarum.

Tíggju ár tók tað at gera Boris Paichadze National Stadium, og stóð tað liðugt í 1976 við pláss fyri 35.000 áskoðarum. Síðani tá er stadion renoverað nakrar ferðir, soleiðis at tað í dag hevur pláss fyri teimum knappliga 80.000 áskoðarunum, sum rúmast har, tá tað er fullsett..

Heilt so nógv fólk vænta tey frá Georgiska Fótbóltssambandinum ikki í dag, men eitt umboð frá teimum segði í gjár, at tað helst fóru at vera umleið 20.000 áskoðarar til dystin móti føroyingum, sum er nakað væl meiri enn tað, sum var á Svangaskarði leygardagin.

Áhugin millum lokalu fjølmiðlafólkini fyri dystinum er heldur ikki lítil, og til venjingina seinnapartin í gjár, vóru knappliga hálvthundrað áskoðarar eisini komnir at hyggja.



*Knappliga 50 fólk vóru komin at hyggja at venjingini hjá føroyska fótbóltslandsliðnum í gjár*

*Mynd: Rólant Waag Dam*